# Fáa væl av sild

Klaksvíkarskipini Christian í Grótinum og Norðborg hava júst verið í Noregi og landað sild, sum tey fingu í norskum sjógvi. Christian í Grótinum var í Kalvåg, har teir landaðu umleið 460 tons, sum teir fingu leygardagin. Norðborg fekk eisini eitt gott kast leygardagin og kom í morgun til Utahug at landa. Uthaug er við Tróndheimsfjørðin. Norðborg var eisini inni fríggjamorgunin. Tá høvdu teir 300 tons, sum teir landaðu í Tromsø.



# Góður sildamarknaður

Fleiri íslendsk virkir hava fingið væl av sild teir seinastu dagarnar, og sambært fjølmiðlunum stendur tað ikki á hjá virkjunum at sleppa av við fløkini. Eitt nú siga tey á Vinnslustøðini í Vestmannaoyggjunum, at eftirspurningurin er stórur í Eysturevropa, og at hann er veksandi í Miðevropa, Týsklandi og Fraklandi. Prísurin er eisini í lagi, og útlitini á marknaðinum eru góð, verður sagt. Vinnslustøðin hevur tvey skip, og sildakvotan er 15.000 tons.



*Tað var her á Ringvegnum, beint við Dalavegin, at ferðsluvanlukka kravdi mannalív, eftir at ein bilførari misti tamarhaldið á bilinum og rendi upp á gongubreytina*

# Ongan møguleika at bjarga lívinum

**Umstøðurnar vóru so óhepnar sum hugsast kunnu, tá ið ein maður doyði av ferðsluvanlukku í gjáramorgunin**

VANLUKKA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var so óheppið, sum tað kundi vera, tá ið ein maður doyði í eini ferðsluvanlukku í Havn klokkan hálvgum sjey sunnumorgunin.

Maðurin gekk á gongubreytini, men kortini varð hann yvirkoyrdur og

So hóast tann 55 ára gamli maðurin gekk, har hann átti at ganga, slapp hann ikki undan, tá ið ein bilur koyrdi upp á gongubreytina og rakti hann so meint, at hann doyði á staðnum.

Maðurin hevði koyrt hýruvogn um náttina og hevði júst sett bilin til tann, ið skuldi yvirtaka koyringina og skuldi spáka sær til hús, tá ið vanlukkan hendi.

Vanlukkan hendi á Marknagilsvegnum, ella Ringvegnum, beint við íbindingina í Dalavegin.

Ein bilur kemur koyrandi norður eftir Ringvegnum, tá ið førarin av onkrari orsøk missur tamarhaldið á bilinum.

Tað er greitt, at bilurin rakar "oynna" mitt á vegnum og fer slongjandi yvir í vinstru síðu, har hann rakar mannin á norðaru gongubreytini.

Eftir ákoyringina, fer bilurin fer bilurin víðari eftir ringvegnum, framvegis uttan at førarin hevur tamarhald á honum og síðani fer hann omanum aftur vegnum og útav í niðaru síðu og oman í bøin.

So hóast løgreglan ikki enn veit, hví førarin misti tamarhaldið á bilinum, metir hon í øllum førum, at ferðin hevur verið í meira lagi.

# 125 tikin við kenning

**Løgreglan hevur aftur hetta vikuskiftið tikið nakrar bilførarar fyri at koyra við kenning og sunnumorgunin varð rúsdrekkakoyrari nummar 125 tikin**

RÚSDREKKAKOYRING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Aftur hetta vikuskiftið vórðu nakrir bilførarar tiknir fyri at koyra við kenning.

Seint leygarkvøldið varð ein tikin fyri rúsdrekkakoyring mitt í Havnini. Hann varð tikin, tí at løgreglan varnaðist, at koyringin var eitt sindur sløðrandi og tí varð bilurin steðgaður.

Tað vísti seg, at bilførarin hevði onki koyrikort. Men tann sum átti bilin var eisini í bilinum og hann verður eisini skuldsettur fyri at hava latið bilin upp í hendurnar á einum fullum manni, sum heldur ikki hevði koyrikort.

Hann kann vænta sær bót, tí áðrenn hann letur lyklarnar frá sær, hevur hann skyldu at tryggja sær, at tann, sum skal koyra bilin, hevur koyrikort og er førur fyri at koyra.

Og sunnumorgunin varð aftur ein tikin fyri at koyra við kenning og løgreglan sigur, at tað er rúsdrekkakoyrari nummar 125 í ár.

Her er bara talan um rúsdrekkakoyrarar, sum løgreglan hevur steðgað í vanligum kanningum, ella, sum eru meldaðir.

Her eru sostatt ikki tey tald við, sum hava koyrt við kenning og sum í hesum sambandi hava elvt til óhapp og vanlukkur.

Tann, sum varð tikin sunnumorgunin, varð tikin í sambandi við ferðsluvanlukkuna í Ringvegnum sunnumorgunin. Í hesum sambandi varð løgreglan á staðnum og skipaði ferðsluna og tá varnaðust tey, at lítið skil var í koyringini hjá tí eina føraranum.

# Ófriðarligt við náttklubbar

**Løgreglan hevur havt úr at gera uttanfyri tveir náttklubbar í Havn**

HARÐSKAPUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið hevði løgreglan nokk at gera uttanfyri ein náttklubba í Havn.

Løgreglan varð boðsend, tí tveir mans høvdu fingið sær tað til ítriv at bróta rútar í náttklubbanum. Teir vórðu báðir tiknir og verða skuldsettir fyri herverk.

Men samstundis komu tveir aðrir og blandaðu seg upp í og vildu teimum ann, sum høvdu brotið rútarnar. Teir báðir vórðu eisini tiknir og løgreglan helt, at tað var neyðugt at seta báðar tveir í kjallaran á løgreglustøðini.

Teir verða skuldsettir fyri at hava brotið politiviðtøkurnar.

Seinni um náttina mátti løgreglan aftur tvær ferðir upp í á sama staði, tí bardagi hevði aftur tikið seg upp við sama náttklubba. Men hesu ferðina var nóg mikið at skilja stríðshanarnar sundur og meiri spurdist ikki burtur úr tí.

Annars fekk løgreglan eisini fráboðan um harðskap uttanfyri ein annan náttklubba, har ein maður stóð og sparkaði ein annan, sum lá niðri.

Tann, sum framdi harðskapin varð tikin og tann, sum var fyri harðskapi, varð fluttur á skaðastovuna, men løgreglan sigur, at hann hevði ikki fingið álvarsligt mein, men hann hevði ein lítlan skurð omanfyri annað eygað.

# Vísti løgregluni nakna reyv

**Aftur hetta vikuskiftið var tað ein, sum helt at tað var stuttligt at vísa løgregluni sín nakna afturpart**

ÓSØMILIGUR ATBURÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kemur oftari og oftari fyri, at fólk halda tað vera stuttligt at vísa løgregluni reyv.

Og aftur hetta vikuskiftið máttu løgreglufólk standa modell til hendan nýggja tjóðarítróttin í náttarlívinum í høvuðsstaðnum.

Tað var mitt í býnum leygarkvøldið, at løgreglan var mitt í býnum í Havn og tá gjørdi ein maður ikki mætari enn at loysa sær buksurnar niður um og stakk sí nakna afturpart upp í eyguni á løgreglufólkunum.

Tey sóu kortini ikki at tað stuttliga í hesum, so maðurin varð tikin við sær á støðina, har hann slapp at gista í kjallaranum.

Hann verður nú skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar og fyri ósømiligan atburð.

Løgreglan sigur, at tað kemur oftari og oftari fyri, at løgreglufólk skulu standa modell til slíkan atburð.